# Spæla ímóti Skotlandi og Írlandi

**HONDBÓLTUR** Hondbóltslandsliðið hjá monnum spælir um vikuskiftið ímóti Skotlandi og Írlandi í trílandakapping í Dublin

Hilmar Jan Hansen

Fríggjamorgunin fer hondbóltslandsliðið hjá monnum á flog úr Vágum við kós ímóti Dublin, har Føroyar um vikuskiftið skulu spæla eina trílandakapping ímóti Skotlandi og Írlandi. Fyrsti dysturin verður fríggjakvøldið ímóti Skotlandi, og leygarkvøldið verður so spælt ímóti Írlandi.

Til kappingina um vikuskiftið hava landsliðsvenjararnir, Dia Midjord og Kári Nielsen, tikið út tilsamans 15 spælarar úr fimm teimum fremstu feløgum í Atlantic Airways-kappingini, harav VÍF eigur fimm, Neistin, KÍF og H71 tríggjar í part og Kyndil ein.

Spælarar úr VÍF eru Rúni Fossdal, Bjarti Hansen, Joen Pauli Høgnesen, Magnus Müller og Áki G. Olsen, úr Neistanum Ári E. Dam, Finnur Hansson og Heini Hanusarson, úr KÍF Andrias Nielsen, Niklas Reginson og Tony Weyhe, úr H71 Levi Nybo, Rógvi Sørensen og Dánjal Torgarð, og úr Kyndli Hans Áki Dal-Christiansen.

Landsliðið kemur heimaftur úr Írlandi sunnukvøldið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



*Savnsmynd*

# Botndystur í kvøld

**KVINNUHONDBÓLTUR** Skal StÍF megna at koma av aftasta plássinum fyri kappingarenda, skal útidysturin ímóti VÍF vinnast

Hilmar Jan Hansen

Ein dystur í Sunset-kappingini verður spældur í Vestmanna í kvøld klokkan 19.45, tá VÍF tekur ímóti StÍF. Hetta eru tey bæði niðastu liðini hjá kvinnunum og VÍF og StÍF hava ávikavist sjey og trý stig.

Liðið, ið liggur oman fyri tey bæði, er Kyndil við 14 stigum, og nú dystirnir fækkast, hevur hvørki av liðunum í veruleikanum tað stóra at spæla fyri, tí tey koma undir øllum umstøðum at enda sum tvey tey niðastu.

Kanska gestirnir hava størri motivatión, tí skal StÍF sleppa av aftasta plássinum, áðrenn kappingin er liðug, er tað í øllum førum eitt krav, at hesin dysturin verður vunnin, tí vinnur VÍF, eru vestmannakvinnur seks stig frammanfyri.

# Skála best í Gøtu

**FÓTBÓLTUR** Finalan í Víkingakappingini í Gøtu um vikuskiftið stóð millum kvinnurnar hjá Skála og Víking, meðan AB og KÍ máttu taka til takkar við at spæla um triðjapláss

Hilmar Jan Hansen

Um vikuskiftið skipaði Víkingur fyri einari kapping í Gøtu millum tey fýra liðini, sum vóru tey fremstu í landskappingini í fjør: KÍ, AB, Skála og Víkingur. Men heldur óvæntað endaði Víkingakappingin næstan við, at stigatalvan frá í fjør vendi á høvdinum.

Tað gjørdist longu greitt leygardagin, tá innleiðandi dystirnir vóru á skránni, tí fyrst vann Víkingur 3-2 á KÍ og síðani vann Skála 1-0 á AB. Báðir dystirnir blivu avgjørdir í evstu løtu. Sostatt skuldu nummar trý og fýra spæla finalu sunnudagin, tá gull- og silvurvinnararnir frá í fjør skuldu spæla um triðjapláss.

Í finaluni eydnaðist skálakvinnum at vinna við einum máli, tær fingu í seinna hálvleiki eftir hornaspark. Hetta var einasta málið í finaludystinum, men tað rakk so til at vinna kappingina. Í dystinum um triðjapláss var KÍ enn eina ferð á odda 2-0, men endaði allíkavæl við at tapa 2-3, so AB fór avstað við sigrinum og KÍ endaði aftast.

Sum sagt, vendu úrslitini kanska eitt sindur øðrvísi, enn tey flestu høvdu væntað frammanundan, og hóast dystir undan sjálvari kappingini sjáldan eru rættiliga álítandi fyri, hvussu seinni verður, kundi kappingin í Gøtu bent á eina munandi meira spennandi kapping hjá kvinnunum, enn tey mongu síðstu árini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**Víkingur - KÍ 3-2 (0-2)**
0-1: Malene Josephsen
0-2: Sigrid Jacobsen
1-2: Hanna I. Højgaard
2-2: Jóhanna Lervig
3-2: Ansy Sevdal

**AB - Skála 0-1 (0-0)**
0-1: Fríðrun Danielsen

**KÍ - AB 2-3 (1-0)**
1-0: Sigrid Jacobsen
2-0: Maria Klakkstein
2-1: Doris í Garði
2-2: Elin Maria Isaksen (br.)
2-3: Elin Maria Isaksen

**Skála - Víkingur 1-0 (0-0)**
1-0: Annika Petersen

# Kvinnusteypið klárt

**FÓTBÓLTUR** Lutakast hevur verið um, hvussu innleiðandi umfarið og fjórðingsfinalurnar í steypakappingin hjá kvinnum í fótbólti skal avgreiðast

Hilmar Jan Hansen

Mánakvøldið var lutakast um steypakappingina hjá kvinnum í fótbólti. Lutakastið var í sendingini 3-2, og tað vóru tveir nevndarlimir í kvinnunevndini hjá Fótbóltssambandinum, Hanna Olsen og Liljan av Fløtum Petersen, sum tóku sær av lutakastinum.

Tað háttaði seg soleiðis, at í innleiðandi umfarinum, sum verður spælt hósdagin 21. apríl, verða teir fýra dystirnir ÍF-HB, MB-B68/NSÍ, FC Suðuroy-EB/Streymur og FF Giza-Víkingur.

Síðani eru fjórðingsfinalurnar á skránni mikudagin 11. mai, og tá spælir vinnarin av ÍF-HB ímóti vinnaranum av FF Giza-Víkingur, vinnarin av MB-B68/NSÍ spælir ímóti Skála og vinnarin av FC Suðuroy-EB/Streymur ímóti AB, og at enda møtast so eisini B36 og KÍ, sum vann steypið í fjør.

Undan hálvfinalunum verður so nýtt lutakast um, hvussu spælt verður víðari. Fyrra hálvfinalan verður hósdagin 2. juni og tann seinna mánadagin 13. juni. Sjálv finalan í steypakappingini hjá kvinnum verður leygardagin 2. juli.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Helgi javnt ímóti Svidler

**TALV** IM Helgi Dam Ziska megnaði í gjár í EM-kappingini at telva javnt ímóti einum av heimsins bestu telvarum, GM Peter Svidler úr Russlandi

Hilmar Jan Hansen

Av teimum yvir 400 telvarunum, sum eru við í EM-kappingini í Aix-les-Bains í Fraklandi, er GM Peter Svidler styrkimettur sum nummar eitt, meðan IM Helgi Dam Ziska liggur í miðjuni sum nummar 199.

Men hóast henda stóra styrkimunin á pappírinum, megnaði Svidler enntá ikki við hvíta fólkinum at koppa Helga, men í staðin endaði talvið javnt eftir 19 leikir.

Merkisvert er, at Svidler eftir øllum at døma hevði fyrireikað seg væl, tí talvkønir siga, at talvið minti nógv um eitt hjá einum, ið telvaði ímóti Helga í OL í fjør, men kortini var tað ikki nóg mikið til meira enn javnt.

Vit hava ikki fingið tað váttað, men sum skilst, er IM Helgi Dam Ziska fyrsti føroyingur nakrantíð, ið megnar at fáa stig ímóti einum telvara í heimsflokki, sum liggur oman fyri 2.700 ratingstig. Svidler, sum er ein av favorittunum at vinna EM, hevur eina ferð verið í Føroyum og kappast, tá hann var yngri.

*hilmarjan@sosialurin.fo*